Dátueftirlitið

Fylgiskjal 3

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
Tinganes
100 Tórshavn

Saltangará, tann 4. februar 2024
J.nr: 24/01187-5
Tykkara skriv:
Málsviðgeri: TH/HAB

Viðvíkjandi.: Hoyringssvar

Dátueftirlitið hevur fingið omanfyrinevnda løgtingslógaruppskot til hoyringar. Dáturáðið hevur viðgjørt uppskotið á fundi tann 25. januar 2024, og hevur hesar viðmerkingar:

Yvirskipað tekur Dátueftirlitið undir við nettrygdarætlanini hjá landsstýrinum.

Dátueftirlitið hevur eftirlit við, at løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum (t.e. dátuverndarlógin) verður hildin. Løgtingslógin hevur sum yvirskipað endamál at verja informationella privatlívið hjá fólki. Hetta verður gjørt á tann hátt, at løgtingslógin ásetur grundleggjandi krøv til viðgerð av persónupplýsingum, m.a. nær og hvussu persónupplýsingar kunnu viðgerðast, og hvørji rættindi tann skráseti hevur í sambandi við slíka viðgerð. Harumframt setur løgtingslógin krøv til viðgerðartrygd, tá persónupplýsingar verða viðgjørdar. Tað hevur m.a. við sær krøv um, at ein dátuábyrgdari skal seta í verk hóskandi bygnaðarligar og tekniskar trygdarfyriskipanir. Dátuábyrgdarar, ið ikki seta í verk slíkar trygdarfyriskipanir, kunnu dømast at rinda sekt fyri brot á dátuverndarlógina.

At størri fokus verður sett á nettrygd sum heild, er tí avgjørt í samljóði við endamálið í dátuverndarlógini, og fer at gagnað arbeiðinum fyri betri dátuvernd í Føroyum.

Tó, so hevur Dátueftirlitið nakrar ítøkiligar viðmerkingar til løgtingslógaruppskotið, soleiðis sum tað fyriliggur. Dátueftirlitið tekur ikki undir við ásetingini um, at dátuverndarlógin ikki skal vera galdandi fyri tað virksemið, ið § 58 a heimiðlar. Endamálið við dátuverndarlógini er at verja privatlívið og rættartrygdina hjá einstaklingum. Dátueftirlitið metir, at hendan verjan viknar munandi, um løgtingslógaruppskotið verður samtykt.

Dátueftirlitið tekur tí *ikki* undir við løgtingslógaruppskotinum, soleiðis sum tað fyriliggur.

Ítøkiligu viðmerkingarnar hjá Dátueftirlitinum kunnu lesast niðanfyri:

Ad. § 58 a, stk. 10 fyrsta petti

Í § 1, stk. 1 nr. 3 í løgtingslógaruppskotinum (uppskot til nýggja § 58a, stk. 10) verður ásett at,

> *"Stk. 10.* ***Løgtingslóg um innlit í fyrisitingina, løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum, løgtingslóg um skjalasovn eru ikki galdandi fyri upplýsingar, mál, kanningar, kortlegging o.a. sambært § 58a.*** *Hetta er eisini galdandi, tá ið upplýsingar, sum eru fingnar til vegar ella eru viðgjørdar sambært § 58 a, eru latnar øðrum myndugleika."* (okkara áherðsla)

Dátueftirlitið

Í serligu viðmerkingunum til ásetingina stendur skrivað:

> *"Lóg um innlit í fyrisitingina, lóg um vernd av persónupplýsingum og lóg um skjalasøvn eru galdandi í sambandi við lóg um fjarskifti. Í mun til upplýsingar, sum verða savnaðar og viðgjørdar við heimild í § 58 a, eru lógirnar ikki galdandi. Upplýsingar, sum er latnar øðrum myndugleika, koma undir somu reglu.*
>
> *Innlit í upplýsingar, sum verða savnaðar inn í sambandi við kortlegging, kunnu knýta seg at fyritøkum, sum dríva vinnuligt virksemi, og kunnu skaða bæði trygdina og kappingina, um álopsmegi ella kappingarneytar umvegis Fjarskiftiseftirlitið ella aðrar myndugleikar kunnu fáa upplýsingar, sum vanliga ikki eru tøkar á marknaðinum. Talan kann vera um bæði trygdar- og handilsloynidómar.*
>
> *Lóg um innlit í fyrisitingina og lóg um vernd av persónupplýsingum hava m.a. sum endamál at verja rættindi hjá tí einstaka og styrkja rættartrygdina í samfelagnum. Ætlanin er ikki at seta hesi endamál til viks, tó er parturin um innlit í hesum lógin ikki í samsvari við endamálið við at fremja nettrygd og verja móti illnati og álopum á samfelagstýðandi undirstøðukervið. Samstundis skal vera víst á, at skipanin við kortlegging í verandi líki er ein byrjan til lóg um nettrygd. Eftir ætlan verða skipanir settar í gildi saman við lógini um nettrygd, sum skulu tryggja rættindini hjá tí einstaka og verja rættartrygdina í sambandi við nettrygd..."*

Dátueftirlitið metir, at tað er ógvuliga víðgongt, at dátuverndarlógin í síni heild ikki skal galda fyri § 58 a. Serliga tá havt verður í huga, at viðmerkingarnar als ikki vísa á tey konkretu fyrilitini, ið gera, at ætlaða broytingin ikki fær tænt sínum endamálið, um so er, at dátuverndarlógin er galdandi.

Dátueftirlitið skal í hesum sambandi vísa á, at § 36 í dátuverndarlógini hevur eina røð av undantøkum til rættindini hjá tí skrásetta. Millum annað í stk. 1, nr. 1 har ásett verður, at kunningarskyldan, rætturin til innlit og um fráboðan til skrásetta sbrt. § 48 í dátuverndarlógini ikki eru galdandi fyri persónupplýsingar sum, um tær koma í ljósmála, kunnu skaða landsins trygd, verju ella samskifti við útlendskar tjóðir ella felagsskapir. Sambært stk. 1 nr. 5 er hetta eisini galdandi, um áhugin hjá skrásetta at fáa kunning eigur at víkja fyri altavgerandi almennum ella privatum áhugamálum.

Dátueftirlitið metir, at hesi nevndu undantøk eiga at vera nøktandi í mun til endamálið við hesum løgtingslógaruppskotið. Sostatt er tað óneyðugt at áseta, at dátuverndarlógin ikki skal vera galdandi. Ætlaða ásetingin hevur ikki bert við sær, at rætturin til innlit fellur burtur, men at *øll* verjan ið dátuverndarlógin gevur fellur burtur í síni heild. Nevnast kann skyldan at boða frá trygdarbrotum og meginreglurnar í § 7 í dátuverndarlógini um m.a. lógilgheit og rímiligheit. Krøvini um viðgerðartrygd, tá persónupplýsingar verða viðgjørdar, fella eisini burtur. Dátueftirlitið skal í tí sambandi minna á, at krøvini um trygd, ið dátuverndarlógin ásetur, eru í løtini einastu alment galdandi lógarkrøvini um KT-trygd í Føroyum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið átti tí sum eitt minstamark, at gjørt púra greitt, í júst hvørjum førum, dátuverndarlógin ikki kann vera galdandi, og hví undantøkini í § 36 í dátuverndarlógini, í júst teimum førunum, ikki eru nøktandi.

Dátueftirlitið

Dátueftirlitið skal vísa á, at lov om Center for Cybersikkerhed[1] (ið tykist vera fyrimyndin til hetta løgtingslógaruppskot) hevur ásetingar, ið nágreiniliga regulera viðgerðina av persónupplýsingum, ið stovnurin fremur sum liður í sínum virksemi. Talan er, í stóran mun, um somu ásetingar sum eru at finna í dátuverndarlógggávuni[2].

Harumframt er Center for Cybersikkerhed, sum ein partur av Forsvarets Efterretningstjeneste, undir eftirliti av Tilsynet med Efterretningstjenesterne, ið m.a. hevur eftirlit við, at Center for Cybersikkerhed heldur ásettu reglurnar um viðgerð av persónupplýsingum.

Eingin slík skipan verður sett í verk við hesi lógarbroyting, og tí er í veruleikanum onki eftirlit við viðgerð av persónupplýsingum, ið fer fram sum partur av virkseminum ið § 58 a heimiðlar.

Í viðmerkingunum viðgongur man, at endamálið við m.a. dátuverndarlógini er, at verja rættartrygdina hjá borgarnum. Sagt verður síðani, at tá endaliga lóggávan um nettrygd verður løgd fram, verða eftir ætlan skipanir settar í verk, ið skulu tryggja rættindini hjá tí einstaka, og verja rættartrygdina í sambandi við nettrygd. Spurt verður, júst hvussu man sær fyri sær, at slíkar skipanir skulu setast í verk, og hví – tá man nú hevur viðgingið, at løgtingslógaruppskotið ger seg inn á rættartrygdina – man ikki setir tær í verk samstundis, sum man ger hesa broytingina.

Ad. § 58 a, stk. 10 seinna petti

Seinna petti í § 58 a, stk. 10 ásetur, at somu undantøk, sum tey omanfyri nevndu, eru galdandi, tá upplýsingar, sum eru fingnar til vega, ella eru viðgjørdar, sambært § 58 a eru latnar øðrum myndugleika. Dátueftirlitið skilur hesa áseting á tann hátt, at dátuverndarlógin heldur ikki skal galdað fyri persónupplýsingar, eftir at upplýsingarnar eru lætnar til triðjapart. Immuniteturin, so at siga, fylgir við upplýsingunum.

Eins og við § 58 a, stk. 10, fyrra petti, metir Dátueftirlitið, at talan er um eina ógvuliga víðgongda áseting. Harumframt er tað heldur ikki grundgivið fyri, júst hví hetta er neyðugt, og hvussu nettrygdin í Føroyum kann gerast betri.

Ásetingin hevur við sær, at Fjarðskiftiseftirlitið kann lata øðrum myndugleika persónupplýsingar, uttan at dátuverndarlógin er galdandi. Dátuverndarlógin er framvegis ikki galdandi, tá ið viðkomandi myndugleiki síðani fer undir víðari viðgerð av persónupplýsingunum. Tað vil aftur siga, at hvørki krøv til heimild, proportionalitet, trygd ella rættindi hjá tí skrásetta eru galdandi. Umframt at vera sera víðgongd, er ásetingin alt ov ógreið, tí hvat er galdandi, um viðkomandi myndugleiki síðani letur upplýsingarnar víðari til ein triðja myndugleika?

Niðurstøða

[1] Lovbekendtgørelse nr. 836 af 7. aug. 2019 om Center for Cybersikkerhed

[2] Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) 2016/679 af 27. april 2016 om beskyttelse af fysiske personer i forbindelse med behandling af personoplysninger og om fri udveksling af sådanne oplysninger og om ophævelse af direktiv 95/46/EF (GDPR) og Lov nr. 502 af 23. maj 2018 om supplerende bestemmelser til forordning om beskyttelse af fysiske personer i forbindelse med behandling af personoplysninger og om fri udveksling af sådanne oplysninger (databeskyttelsesloven)

Dátueftirlitið

Niðurstøðan hjá Dátueftirlitinum er, at rættartrygdin hjá einstaklinginum viknar munandi, um løgtingslógaruppskotið verður samtykt, soleiðis sum tað fyrliggur, og at ásetingin, um at dátuverndarlógin ikki skal vera galdandi, er púra óneyðug, sæð í ljósinum av teimum undantøkum sum dátuverndarlógin longu heimiðlar.

Mint verður á, at Løgtingið sambært § 4 í dátuverndarlógini hevur samtykt, at onnur lóggáva bert eigur at vera galdandi framum dátuverndarlógina í tann mun, at viðkomandi lóggáva gevur tí skrásetta betri rættindi enn dátuverndarlógin.

Dátueftirlitið skal tí staðliga mæla frá, at § 58 a, stk. 10 verður sett í løgtingslógina soleiðis sum ásetingin nú er orðað.

Vegna Dátueftirlitið,

Tóri Højgaard
stjóri

Helga á Borg
formaður í Dáturáðnum